Kyndil-Neistin 24-34 (10-21):

# Neistin smurdi Kyndil av

**Við einum sannførandi sigri á oddaliðnum Kyndli, syrgdi mansliðið hjá Neistanum fyri, at spenningur av álvara kom í landskappingina**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Neistin lat ongantíð nakran iva verða um, at teir ætlaðu sær bæði stigini, tá ið teir dystaðust við oddaliðið Kyndil í høllini á Hálsi sunnudagin. Frá fyrsta bríksli settu teir seg á dystin, og longu áðrenn komið var til hálvleiks, var dysturin avgjørdur.




*Serliga var tað kropsliga styrkin, ið var á muni, tá Neistin vann ruddiligan sigur á Kyndli sunnudagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Liðskiparin misti høvdið

Neistin fekk eina góða byrjan upp á dystin. Longu tá ið tíggju minuttir vóru leiktir høvdu neistamenn lagt seg á odda við fimm málum 7-2, og harafturat hevði ein av týdningarmiklastu leikarunum hjá Kyndli, liðskiparin Hans Áki Dal-Christiansen fingið reyða kortið.

Tað var eitt rættuliga býtt reytt kort, ið Hans Áki ognaði sær. Í eini álopsroynd var hann tikin heldur harðliga av neistaverjuni, men dómararnir lótu ikki við seg koma, og tá ið Neistin skal fara í skjótálop, ger ein liggjandi Hans Áki ikki mætari enn at lyfta beinið framman fyri Karl Oddmari Rasmussen hjá Neistanum, so at hesin fer um koll. Ein óneyðug gerð og ein dyggur smeitur fyri Kyndil, tí dómararnir báðir høvdu einki annað val enn at geva Hans Áka reyða kortið.

Álopsspælið hjá Neistanum var flúgvandi í fyrra hálvleiki. Bakketan við Heina Hanusarsyni, Áka Mørk og Dragisa Stojovic var allatíðina vandamikil, og úti á vinstra vongi var Blagoje Buha sera væl upplagdur. Buha skal ikki hava serliga nógv pláss at leypa inn av vonginum, og tað er ógvuliga sjáldan, at hann ikki skorar upp á royndirnar hjá sær. Nógv ferð var á álopsspælinum hjá Neistanum, og kyndilsverjan hevði stórar trupulleikar av kropssterku neistaleikarunum. Tað sigur eisini nógv um gongdina, at tvær ferðir í fyrra hálvleiki, eydnaðist tað Neistanum at skora, hóast teir høvdu ein mann minni!

Í hinum endanum hevði Kyndil ilt við at fáa gongd á álopsspælið hjá sær. Dysturin sunnudagin var enn eitt dømi um, hvussu illa tað koyrir hjá Kyndli, tá ið Jacob Jónsson verður mansvardur, sum hann var allan dystin sunnudagin. Tá ið so Hans Áki Dal-Christiansen, ið er toppskjútti hjá Kyndli, eisini er úti av myndini, er álopið hjá teimum grønu munandi skert. Harafturat økti tað ikki um møguleikarnar hjá Kyndli, at Joto í neistamálinum spældi ein sera góðan dyst, og fleiri ferðir bjargaði hann frá púra leysum kyndlaleikarum. Serliga vóru tað vengurnir hjá Kyndli, ið vóru syndararnir, tí ikki færri enn sjey ferðir fyri steðgin misbrúkti Kyndil úti í borðunum.

Alt hetta gjørdi, at tá ið teir fyrstu 30 minuttirnir vóru leiktir, var dysturin at kalla avgjørdur, tí tá høvdu neistamenn ognað sær eina ótrúliga ellivumáls leiðslu, 21-10, og sjálvt tey trúgvastu viðhaldsfólkini hjá Kyndli høvdu hug at rýma.

## Nakað av spenningi kom í

Kyndil satsaði frá byrjan av seinna hálvleiki. Bæði Heini og Dragisa hjá Neistanum blivu mansvardir, og hetta gjørdi at álopsspælið hjá Neistanum bleiv ógvuliga óskipað og tilvildarligt. Teir gjørdu nógv mistøk, og tá ið teir grønu samstundis fingu skil á álopsspælið hjá sær undir leiðslu av veteraninum Jónleif Sólsker, minkaði munurin støðugt.

Neistamenninir blivu sjónligani stressaðir, og hetta viðførdi millum annað at teir tilognaðu sær fleiri útvísingar. Tá ið teir so samstundis sendu menn inn aftur á vøllin, áðrenn teir báðir minuttirnir vóru farnir, gjørdist støðan ikki betur. Spakuliga nærkaðist Kyndil, og tá ið tíggju minuttir vóru eftir at leika, var munurin bara fýra mál. Serliga var tað Josef Abrahamsen, ið yvirtók vinstra vong hjá Kyndli í seinna hálvleiki, sum smekkaði bóltarnar í kassan.

Samstundis sum Kyndil nærkaðist hóttu reyð kort Neistan, tí bæði Heini Hanusarson, Dragisa Stojovic og Karl Oddmar Rasmussen høvdu fingið tvær útvísingar í part, so fingu teir eina afturat, fingu teir eisini reyða kortið. Men Kyndil megnaði ikki at seta trumf á, og tá ið Heini Hanusarson úr einum ógvuliga spískum vinkli langaði bóltin í kassan umvegis Jóhan Danielsen og legði Neistan á odda 28-23 tíggju minuttir fyri leiklok, var tað sum fór gassið av ballónuni hjá teimum grønu. Ístaðin sprellaði Neistin seinastu løtuna, og tá ið avtornaði høvdu neistamenn vunnið við tíggju málum 34-24, og av álvara fingið spenning aftur í landskappingina.

## Stórur munur á kropsstyrki

Ein av sjónligastu mununum á liðunum báðum sunnudagin var kropsstyrkin. Neistin hevur í Karl Oddmari Rasmussen, Heina Hanusarsyni, Dragisa Stojovic og Áka Mørk nakrar vælvaksnar og kropssterkar mans, og tá ið Kyndil tíðliga í dystinum misti Hans Áka Dal-Christiansen, mistu teir samstundis ein av sínum heilt fáu leikarum, ið likamliga stendur neistamonnunum mát. Serliga í fyrra hálvleiki var miðverjan hjá Neistanum sum ein múrur, har ikki bar til hjá teimum grønu at bróta seg ígjøgnum.

Somuleiðis hevur Neistin fleiri møguleikar í álopinum við skotsterku Heina Hanusarson, Áka Mørk og Dragisa Stojovic. Kyndil hinvegin dúvar meiri upp á at spæla seg ígjøgnum heldur enn at royna seg við langskotum.

Eitt er so heilt vist. Við tí spæli Neistin vísti í fyrra hálvleiki sunnudagin, er tað ilt at síggja nakað lið í Føroyum, ið kann gera nakað við teir. Kyndil er tó framvegis oddalið, men tað tykist sum um tað hvílir ov nógv á einstøkum spælarum hjá teimum grønu úr Havn.

## Kyndil-Neistin 24-34 (10-21)

**Kyndil:** Josef Abrahamsen 7(2), Ken Zachariasen 4(3), Janus Einar Sørensen 4, Jacob Jónsson 3, Høgni Klein 3, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Jónleif Sólsker 1, Finnur Hansson 1
**Neistin:** Blagoje Buha 9(1), Dragisa Stojovic 6, Heini Hanusarson 6, Áki Mørk 5, Karl O. Rasmussen 2, Helgi Justinussen 2, Dann Thorleifsson 2, Ragnar Stakksund 1, Ári Rouch 1
**Brotskøst:** Kyndil 8(5), Neistin 1(1)
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 8

**Dómarar:** Trygvi Mortensen og Kári Hansen – komu væl frá einari trupulari uppgávu, har teir vístu, hvat teir loyvdu, og hvat teir ikki loyvdu. Millum annað fingu báðir venjararnir ávaring fyri at brúka seg í fyrra hálvleiki, og so var friður av teimum.



Stjørnan-VB 19-26 (9-13):

# Stjørnan fekk eitt klask

**VB-kvinnurnar endurreistu seg sjálvar sum FM-favorittar, tá tær í Klaksvík fingu Stjørnuna at síggja bæði stjørnur og mánar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ætlaða gullveitslan í Klaksvík varð av ongum sunnudagin. Her hevði Stjørnan annars gyltan møguleika at taka eitt heilt avgerandi fet móti FM-heitinum, tá VB kom á vitjan, tí hóast talan bert var um fjórða dystin í endaspælinum, so vildi ein heimasigur her opna eitt somikið stórt glopp niður til VB, at tað allar helst bert var í teori'ini, at klaksvíkskvinnurnar kundu missa hetta.

## Tendraðar frá fyrsta bríksli

Um so hevði verið, so hevði helst okkurt slag av veitslu verið hildið onkra staðni í Klaksvíkini, men hetta varð so av ongum. Og um veitslan var nakrastaðni, so mundi tað vera á drúgvu ferðini hjá VB, tá tær sunnukvøldið ferðaðust heim aftur til Vágs við tveimum stigum at koyra í posan.

Og lat tað beinan vegin verða sagt, at sigurin hjá VB var so ruddiliga uppiborin. Frá fyrsta bríksli sýndu tær, at tær fram um alt høvdu viljan til at syrgja fyri, at gullmerkini frá í fjør ikki so lætt skuldu latast av hondum. Verjan stóoð sum ein múrur frá fyrsta bríksli, og hóast Stjørnan royndi at seta dagsskránna við eyðkenda tempo-hondbóltinum, so hjálpti hetta lítið. Fyri hvørjum gjøgnumbroti og fyri hvørjari skotroynd stóð onkur VB-kvinna fyri, og einastu ferð Stjørnan á talvuni stóð við stigunum var, tá tær fyrstu minuttirnar vóru á odda 2-1.

Eftir hetta vóru tað nevnliga VB, sum vóru tær stinnaru. Tær brúktu vápnið hjá Stjørnuni, har bólturin varð koyrdur skjótt runt á vøllinum, og serliga á vengrunum megnaðu tær ofta at spæla tungt, meðan Daiva og Aukse ikki vóru at steðga mitt fyri.

## Stuttligur mótleikur

Eftir 20 minuttum hevði VB soleiðis toygt seg upp á 11-4. Ein støða, sum væl kundi verið nógv verri, um ikki Lidia Vladic tók sær av somikið nógvum hesa løtuna. Og tað mundi standa øllum greitt, at skuldi Stjørnan gera nakað sum helst, so máttu stór stig takast.

Hetta varð eisini roynt, tá Stjørnan longu nú fór út í mansverju av báðum teimum útlendsku leikarunum. Ein mansverja, sum fram til steðgin tóktist at muna væl, soleiðis at munurin minkaði niður í fýra mál. Men vandin við at nýta mansverju somikið tíðliga í dystinum er jú, at mótstøðan hevur góðar stundir at finna sær eitt mót-trekk, og tað var eisini júst hetta, sum VB nýtti steðgin til.

Tað sá kanska eitt sindur komiskt út til tíðir, nú VB hevði latið at kalla alla skipan á spælinum verið eftir í skiftirúminum. Bæði tær báðar, Daiva og Aukse, sum skuldu mansverjast – men eisini hinar á liðnum, fóru ferð eftir ferð rótandi inn í Stjørnu-verjuna. Skil varð ikki hildið á, hvør skuldi halda vongplássið og hvør spældi mitt fyri, og fyri tað nógva gav hetta útslag í einum stórum vøsi. At Stjørnan so eisini lat seg draga við í óskipaða spælið, samstundis sum VB sýndi, at tær ein móti einum hava ein sera sterkan hóp, gav eisini júst tað støðuna, sum VB hevði ynskt sær. Stjørnan tók sær time-out, har liðið varð umskipað nakað og mansverjan slept, og so kundu føroyameistaranrir aftur fara at spæla vanligan hondbólt, har tær nú bert skuldu syrgja fyri, at sigurin varð koyrdur heim.

## VB eigur fyrimunin

Og tað bleiv hann eisini so ruddiliga. Tó at møðin nú var farin at merkjast á leikarunum – tær framdu onga útskifting gjøgnum allan dystin – so tóktust tær alla tíðina hava yvirskotið til at seta trumf á, og tá Stjørnan eitt skifti aftur minkaði niður í fýra mál, varð seinasti seymurin smíðaður. Trý kvik mál á rað beindu allan iva til viks, og so kundu ljódligu VB-áskoðararnir seta enn meira volumu á røddirnar, sum fyri tað mesta doyvdu at kalla alt ljóð frá KÍ-áskoðurnum, sum helst mundu telja tann allar størsta partin av teimum 700 áskoðarunum, sum vóru til staðar.

Og tey hjá VB høvdu eisini alla orsøk at fagnast – og tað sama hevur hondbóltskappingini sum so eisini. Sigurin blásti nevnliga kvinnukappingina víðopna aftur, og skal nakað tos vera um favorittar nú, so má tað helst blíva VB. Fram um Stjørnuna, so hava tær nevnliga tann fyrimunin, at tær hava leikt á útivølli móti bæði Stjørnuni og VÍF, og tað vil so við øðrum orðum siga, at tá teir heilt avgerandi dystirnir eru á skránni, so verður hetta í VB-høllini, sum ikki man kennast sum nakað hugagott stað at vera hjá einum útiliði.

Stjørnan hevur sjálvandi framvegis fyrimunin av einum stigi, men tað kann skjótt vísa seg at verða ein stokkum gleði. Við útidystum í bæði Vestmanna og Vági hava tær eisini eina óvanliga trupla dystarskrá eftir, og nú hava tær so ikki tey fimm ætlaðu stigini at dúva uppá.

## Steypafavorittar

Og so slepst heldur ikki undan at nevna, at VB við sigrinum staðfestu seg sjálvar sum favorittar at endurvinna steypakappingina.

Her verður mótstøðuliðið enn einaferð Stjørnan, men sunnudagurin sýndi í øllum førum, at tað tá mest stendur á, so eru tað í løtuni tær hjá VB, sum tykjast betri gearaðar til uppgávuna. Heldur enn at lammast av uppgávuni, varð avrikið hjá hvørjum einstøkum leikarai skrúvað langt uppeftir, og tann partin av spælinum megnaði Stjørnan so ikki hesaferð. Skulu tær gera nakað sum helst við VB nú leygardagin, so krevst av teimum, at eisini sálarligi parturin av spælinum fæst í rættlag, og longu áðrenn tað skal gerast, eru stór sár, sum mugu lekjast.



*Hóast Una Olsen sum vant royndi at toga liðfelagarnar upp, so munaði tað lítið móti einum VB-liði, sum leiddi tankarnar móti suverena FM-heitinum í fjør*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Dysturin í tølum

**Stjørnan-VB 19-26 (9-13)**
Málskjúttar
Stjørnan: Anna Kristina Samson 4, Katarina Stepanov 4, Una Olsen 3, Joan M. Djordjevic 3(2), Bára S. Klakstein 3, Annika Ljósstein 1, Alina Olaru 1
VB: Aukse Vysniaskaite 9(4), Daiva Toumaite 7, Margreth Augustinussen 4, Gurið Mortensen 4, Rannvá Augustinussen 1, Laila Jespersen 1
Brotskøst: Stjørnan 3, VB 4
Útvísingar: Stjørnan 2, VB 3
Dómarar úr Neistanum/Kyndli: Kristian Johansen & Gunnar Gregoriussen. Tá størsta trætumálið í dystinum var ein kontradómur viðvíkjandi mál- ella hornakasti (og har var endaligi dómurin eisini rættur), so sigur tað sína egnu søgu um eitt avbera gott dómaraavrik.